## Laudrup-lýsing hjálpti

Seinastu tíðina hava sjónvarpslýsingar verið at sæð, har Michael Laudrup hevur roynt at sannført danir um, at havragrýn frá Ota eru rætti kosturin.
Og alt bendir á, at lýsingarnar hava havt ynsktu ávirkanina. Ota kann nevnliga boða frá, at sølan av havragrýnum er økt við 16% seinastu tíðina, og tað fegnast leiðslan sjálvandi um.
- Vit hava ongan tíð áður merkt eina somikið stóra effekt frá eini einstakari lýsing. Sølan var annars stagnerað seinastu tíðina, og tí er ein somikið stórur vøkstur avgjørt nakað, sum vit fegnast um, sigur Henrik Pasgaard, marknaðarleiðari hjá Ota, við Ritzau.

*-mørk*



## Smyril økir túratalið

Frá mánadegnum komandi verður túratalið hjá Smyrli um Suðuroyarfjørð økt úr 28 upp í 34 um vikuna. Arbeitt hevur verið við nýggjari ferðaætlan í eina tíð, og í hesum sambandi hevur verið tosað við ymsar áhugabólkar. Hartil hevur manningin á strandfaraskipunum hoyringsfreist í slíkum málum, og tí eru broytingarnar eisini viðgjørdar her, verður sagt á sudurras.fo

*-mørk*

# 25 hval løgdu beinini við Norðskála

**Tað var á midnátt at grindin legði beinini, eftir eitt væleydnað dráp. Lítla grindin var annars ikki heilt so nem at fáast við**

GRIND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Grindin varð funnin út fyri Tjørnuvík um 21-tíðina í gjárkvøldið. Mett var beinanvegin, at grindin taldi umleið 30 hval, og tá hon hevði lagt beinini tríggjar tímar seinni var greitt, at hetta skotið ikki var heilt av leið. Tí tá alt var talt saman vísti tað seg, at talan var um 25 hval.

### Kavaði illa

Tað gekk ikki heilt sum ætlað at reka grindina. Lítli flokkurin av hvalum kavaði illa, og tískil var ringt at fáa rakstur á hana. Ikki var gjørligt at reka hana inn á Tjørnuvík, eins og gjørt var við aðra grind fyrr í ár, tá brimi var so ógvusligt har.
Rákið passaði heldur ikki heilt, og tí var neyðugt at bíða eftir kyrrindum áðrenn grindin kundi haldast til við Norðskála. Men tað var ikki bara sum at siga tað at fáa lítla hvalaflokkin at gera landgongd, so hvalirnir komu inn í smærri bólkum í fleiri umførum.
Sjálvt drápið gekk tó ógvuliga væl.



*Talan var um rímiliga stórar hval, og tilsamans var talan um 201 skinn*

*Mynd: Sólgerð Andreassen*



### Stórir hval

Eftir væleydnaða drápið skuldi grindin fáast upp á turt. Tá var tað, at kranin streykaði eina løtu og tí gekk hetta heldur ikki so skjótt sum ætlað. Men upp á turt komu teir so, og hóast hvalirnir vóru fáir so vóru teir kortini stórir. Hálvgum seks í morgun var liðugt at merkja, og sambært sýðslumanninum gjørdist tað tilsamans 201 skinn. Klokkan tíggju komu seðlarnir út.

*Tað var klokkan tíggju í morgun, at seðlarnir komu út*

*Mynd: Hans Marius í Byrgi*

## Broyttir strandferðsluprísir

Løgtingið hevur játtað 5 mió kr. til lækkingar í ferðaseðlaprísinum, og koma príslækkingar avleiddar av hesum í gildi mánadagin, komandi. Príslækkingin umfatar bert Oyggjaleiðir. Í hesum eru eisini roknaðir tveir dagar um árið, har frítt verður at sigla og koyra við Strandfaraskipum Landsins. Nær hesir dagar verða, er ikki fastlagt enn.
Í høvuðsheitinum merkir hetta, at ferðaseðlar fyri ferðafólk lækka við uml. 50%, og ferðaseðlar fyri akfør lækka við uml. 22%.
Eisini hevur Strandferðslan broytt skipan, soleiðis at ferðaseðil bert verður rindaður annan vegin. Hetta á sama hátt, sum tá ferðast verður gjøgnum undirsjóvartunlarnar.
Eisini eru aðrar smærri broytingar og tillagingar gjørdar, og verður tað eitt nú møguleiki at keypa mánaðarkort fyri persónbilar.
Á Mykinesleiðini verða prísirnir ikki broyttir, av tí at tað so at siga bert eru ferðafólk, sum brúka farleiðina. Tó ber til hjá teimum, sum búgva á oynni, ella hava tætt tilknýti til oynna, at fáa eitt borgarakort, sum gevur rætt til somu prísir sum á teimum styttri leiðinum.

# Kvinnan leyslatin

**Ein kvinna, sum fyri tveimum vikum síðani varð handtikin og varðhaldsfongslað, eftir at hava stungið ein mann varð í gjár leyslatin**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kvinnan varð varðhaldsfongslað til í gjár, tá tað í rættinum skuldi avgerast, um varðhaldsfongslingin skuldi leingjast. Ákærin ynskti, at varðhaldsfongslingin varð longd, men hetta var avvíst og tískil varð kvinnan leyslatin. Ákærin hevur tó kært hesa avgerð.
Kvinnan hevur annars sitið varðhaldsfongslað síðani hon varð handtikin leygarnáttina 30. juni. Hon og maðurin, hon búði saman við vóru farin til hendurs, og endin var at hon stakk mannin við einum knívi. Løgreglan kom á staðið og skilti partarnar sundur.
Maðurin varð fluttur á Landssjúkrahúsið, og har varð staðfest, at støða hansara stabil og at hann var uttanfyri lívsvanda.



Maður stungin